# Øll tóku lut

**FJALLGONGA** Ein dag í september mánaði vóru hvalbingar á fjalli í Lítla Dímun. - Tað var týðiligt at síggja, at fólkið stóð saman um hesa uppgávuna, sigur sjómanstrúboðarin, Torleif Johannesen, sum var í Hvalba, tá teir komu aftur við seyðinum

Snorri Brend

**Hvalba:** – Hetta var ein stemningsfull løta, sigur Torleif, ið er ættaður av Nesi í Eysturoynni.

Hvalbingar høvdu til hetta høvið leigað sær sluppina Jóhannu úr Vági til at fara út í Dímun við.

Raksturin henda mánadagin 27. september gekk væl, hóast tað leið nakað út á kvøldið, áðrenn teir vóru aftur í Hvalba.

– Eg vitjaði í oynni, og fór oman á bryggjuna um 10-tíðina hetta kvøldið. Og eg má siga, at tað var tað bæði hugnaligt og hugaligt at síggja lívið.

– Har stríddust menn við at viga seyð, meðan aðrir sleptu teimum inn í búrini, teir høvdu sett upp á bryggjuni. Og onnur fólk, ið ikki beinleiðis høvdu uppgávur stóðu og eygleiddu, prátaðu saman og hugnaðu sær, greiðir Torleif frá.

## Siðvenja

Við Suðuroyarportalin vísir hann á, at tað var hugaligt at síggja, at børnini eisini sluppu upp í part.

Tey tóku ímóti seyðinum tá hann var lyftur upp av dekkinum á Jóhannu og upp á bryggjuna. Síðani stóðu tey í bíðirøðum, við seyðinum í hondunum, og bíðaðu eftir, til teirra túrur var at viga seyðin.

– Eg fekk at vita, at megin-parturin av seyðinum varð býttur út til eigararnar. Nakað verður selt á uppboðssølu, og fer hesin peningurin til ymiskt í samband við arbeiðið í Lítla Dímun, sigur Torleif Johannsen.

Hann endar hesa lýsingina av bygdarlívi í Hvalba við hesum orðum:

– Mín uppliving var, at fólkið stóð saman um hesa uppgávu, sum meiri hevur við siðvenju og áhuga at gera, enn fíggjarligar spekulatiónir.

snorri@sosialurin.fo

## 6 SEYÐIR

Á heimasíðuni hjá Lítlu Dímun - www.ldimun.com - verður upplýst, at alt gekk gott, hóast tað var nógv ungt og ókent fólk við.

Eftir at seyðurin var komin til lands, var hann býttur, og vóru tað 6 seyðir uppá gyllin.




*Seyðurin verður vigaður. Seinni varð hann seldur á uppboði*

**VIÐ SLUPP**

*Jóhanna við bryggju í Hvalba, meðan menn viga seyðin og koyra hann í búrini á bryggjuni*

*Mynd: Torleif Johannesen*